# Føroysk børn í Sødertalje og spæla sjónleik

**– Í dag fara tveir bólkar av barnasjónleikarum til Sødertalje í Svøríki at vera við í einum norðurlendskum sjónleikafagnaði. Níggju bólkar eru við, og eru Føroyar einasta norðanland, ið hevur fingið tveir bólkar við.**

SJÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Tilsamans 25 børn og vaksin fara komandi vikuna at vera við í norðurlendskum sjónleikarafagnaði í Svøríki. Av hesum 25 eru 19 børn, og kemst tað av, at hesin sjónleikafagnaður er fyri børn.

Við á fagnaðinum eru 150 børn frá ávíkavist Svøríki, Noregi, Danmark, Finlandi, Føroyum og Íslandi.

Byrjað verður sunnudagin 30. septembur, og børnini koma heim aftur til Føroya tann 6. oktober.

Hetta tiltak var fyrstu ferð á skránni í 1994, og var tað Nordisk Amatørråd, sum tók stig til tess.

Málið við tiltakinum er at stuðla og menna barnasjónleik, har børn eru sjónleikarar og spæla fyri øðrum børnum.

Dramaverkstaðið hjá Hjørdis Johansen hevur 10 børn og trý vaksin við, og tey fara at framføra leikin »Fremmanda Gentan«, ið Oddvør Johansen hevur skrivað. Hann er um, hvussu er at vera flóttafólk í fremmandum landi. Leikurin varir 17 minuttir.

Barnaskúli Havnar Sjónleikarafelags v/ Hedvig Westerlund fer við níggju børnum og trimum vaksnum at spæla »Snjódrottningin« eftir H.C Andersen. Hesin leikur er um Kaj og Gerdu, sum lurta eftir søgum, ið omman sigur frá. Yndissøgan er tann um snjódrottningina.

Báðir leikirnir verða spældir á føroyskum.

# Faroe Salmon keypt danskt roykivirki

**Faroe Salmon fer at lata laks til danskt roykivirkið, sum føroyska felagið hevur keypt seg inn í**

ALIVINNA
*Eyðun Klakstein*


*Faroe Salmon er í holt við at byggja nýtt og stórt kryvjivirkið á vestara kaiøki í Klaksvík*

**Klaksvík:** Stóra alifyritøkan í Norðoyggjum, Faroe Salmon, hevur keypt bróðurpartin av danska roykivirkinum Vendsyssel Danmark.

Lokalblaðið Norðlýsið skrivar í gjár, at Faroe Salmon, sum hevur heimstað í Klaksvík, hevur keypt helvtina av partapeninginum í danska felagnum, men at felagið hevur meirilutan í nevndini, og tí eisini hevur avgerðarrættin.

## Lata laks til virkið

Vendsyssel Danmark er ein virdur framleiðari, sum er kendur fyri at gera góðar vørur. Fyritøkan hevur havt fíggjarligar trupulleikar, og tí er Faroe Salmon komið við í felagið.

– Ætlanin er at vit skulu lata laks til danska roykivirkið. Vit halda ikki, at tað er rætt framhaldandi at selja kruvdan laks óvirkaðan, tí prísirnir eru so svikaligur, sigur stjórin í Faroe Salmon, Jón Purkhús, við Norðlýsið.

## Søludeild í Spania

Faroe Salmon er í løtuni í holt við at byggja stórt kryvjivirkið ár vestara kaiøki í Klaksvík.

Men tað er ikki bert á heimavølli, at felagið veksur um sítt virksemi.

Nú Faroe Salmon hevur keypt danska roykivirkið, fara teir eisini at gera eina nýggja søludeild í Malaga í Spania, har seks fólk koma at starvast.


# Løgfrøðingur til Føroya Tele

»Tað truplasta í lívinum, er at vita, hvørja brúgv ein skal fara yvirum, og hvørja brúgv ein skal brenna«

David Russel



Samskiftið við onnur vaksur dag um dag, og fjarskifti er vorðið eitt lykilorð í einum framkomnum samfelag. Á Føroya Tele taka vit við gleði ímóti teimum avbjóðingum, sum av hesum standa, og fyri at standa so væl búgvin sum til ber, mugu leiðslа og starvsfólk kunna fáa góða vegleiðing.

Føroya Tele stendur fyri at víðka um løgfrøðiliga støðina. Arbeiðsuppgávur, sum liggja fyri framman eru sera fjølbroyttar, men liggja tó mest innanfyri almennan vinnulívsrætt, m.a. innan fjarskifti, kapping og KT.

Hvønn dag stinga nógvir innanhýsis og uttanhýsis løgfrøðiligir spurningar seg upp, sum krevja skjóta og góða viðgerð. At arbeiða saman við verandi løgfrøðingi okkara, søkja vit til eftir einum løgfrøðingi aftrat.

**Tað er ein fyrimunur um tú hevur:**
- arbeiðsroyndir úr líknandi starvi
- góðan førleika í føroyskum, donskum og enskum í skrivt og talu
- samráðingarroyndir
- edv- førleika á brúkarastøði
- góð samstarvsevni, umframt førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Føroya Tele kann bjóða eitt starv í einum mennandi umhvørvi við**
- fakligari og persónligari menning
- endurútbúgvingar- og skeiðmøguleikum
- góðum arbeiðsumhvørvi
- møguleika at leggja arbeiðstíðirnar til rættis eftir persónligum tørvi

Løn og setanarviðurskifti verða sambært avtalu. Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarv við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framíhjárætt til ansingarpláss.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jens Wang, løgfrøðing, á beinleiðis tel 303377 ella til Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skal vera Føroya Tele í hendi í seinsta lagi fríggjadagin 19. oktobur 2001 og skal sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Sum Føroya størsta fjarskiftisfyritøka hevur Føroya Tele ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Nettosølan var í 2000 kr. 242 mió. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið.**

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!




# Útvarpið kappast móti skrivligu miðlunum


*Útvarp Føroya fer nú at leggja skrivlig tíðindi á netið. Soleiðis fer útvarpið at kappast við skrivligu miðlarnar*

**Útvarp Føroya arbeiðir í løtuni við at gera eina nýggja heimasíðu. Ein partur av hesi síðuni verður, at skrivlig tíðindi verða løgd á netið. Hetta fer at økja um kappingina um føroyskan tíðindaflutning á netinum**

TÍÐINDAFLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*

Útvarp Føroya fer nú eisini at bjóða brúkarum sínum skrivlig tíðindi. Hesi fara at liggja á heimasíðuni hjá útvarpinum, har øll kunnu lesa tey uttan at gjalda.

Jógvan Jespersen, stjóri í útvarpinum, sigur, at hetta er ein náttúrlig menning í tíðindaflutninginum hjá stovninum.

– Brúkarin kann í dag lurta eftir tíðindum á netinum, og tað at leggja skrivað tíðindini á netið er so ein nýggj tænasta, sum vit fara at bjóða, sigur Jógvan Jespersen.

Tíðindafólk í útvarpinum skriva øll tíðindini til sendingarnar, og tí er tað lætt at leggja tey áhugaverdastu tíðindini á netið umframt. Hetta fer tískil ikki at økja stórvegis um arbeiðsbyrðuna hjá tíðindafólkunum.

## Kapping

Í dag eru fleiri føroyskar heimasíður, sum leggja seg eftir at hava tíðindi, og tær fáa nú kapping frá útvarpinum.

– Tað er ikki meira enn náttúrligt hjá okkum at fara inn á hetta økið, og harvið veita vit okkara brúkarum í Føroyum og uttanlands eina betri tænastu, sigur stjórin, sum enn ikki veit, um talan verður um at leggja øll tíðindini út á netið ella bara tey mest áhugaverdu.

– Vit røkka ikki okkara brúkarum ígjøgnum hátalaran einans, men eisini um internetið. Longri frammi í tíðini verður internetið eisini ein partur av okkara sendineti. Avmarkingarnar liggja í nýtslukostnaðinum, og hvussu væl internetið virkar, sigur Jógvan um framtíðarútlitini hjá útvarpinum á internetinum. So hvørt sum internetið verður brúkaravingarligari, økist talið av teimum, sum nýta internetið sum sendinet.

Nýggja heimasíðan verður væntandi klár um ein mánaða, og hon hevur eitt heilt nýtt snið og útsjónd. Arbeitt hevur verið við heimasíðuni í nakrar mánaðir, og nú verður hon skjótt klár at leggja fyri almenninginum.

# Rentan lækkar


*Peningastovnarnir hava lækkað rentuna á flestu lánum*

**Teir stóru peningastovnarnir hava boðað frá, at teir lækka rentuna á flestu lánum. Orsøkin er, at danski Tjóðbankin hevur lækkað rentuna**

RENTA
*Stefan í Skorini*

Føroya Banki boðar í tíðindaskrivi frá, at bankin lækkar rentustig síni við 0,25-0,50 prosentum. Henda lækkingin kemur í gildi frá 1. oktober.

Grundgevingin hjá bankanum er, at danski Tjóðbankin hevur lækkað sína rentu við hálvum prosenti.

Rentustigini viðvíkjandi meginpartinum av útlánum bankans lækka við 0,25 prosentum. Rentan á vanligum innlánum verður ikki lækkað.

Føroya Sparikassi lækkar eisini rentustigið við 0,50-0,75 prosentstigi. Grundgevingin er eisini, at danski Tjóðbankin hevur lækkað rentuna. Rentan á vanligum konti lækkar ikki.

Til tess at eggja til størri uppsparing, áðrenn fólk seta føtur undir egið borð, hevur Sparikassin valt ikki at lækka rentuna á bústaðarkonto.

Renta á billánum í Føroya Sparikassa lækkar við 0,75 prosenti og er nú millum 5,75 og 7,75 um árið.

Óla Jákup Rólantsson:

# Rás 2 hevur eina framtíð

**Óla Jákup Rólantsson er givin á Rás 2 av persónligum orsøkum. Hann væntar tó, at rásarúm er fyri Rás 2 í framtíðini, tí politikarar og onnur eru farin at tosa um at betra umstøðurnar hjá einasta kappingarneytanum hjá Útvarpi Føroya**

ÚTVARP
*Stefan í Skorini*


*Óla Jákup Rólantsson heldur, at Útvarp Føroya er nógv broytt, síðan Rás 2 fór undir at senda*

Í meira enn hálvtannað ár hevur Óla Jákup Rólantsson verið programmleiðari á Rás 2, og hann hevur verið við frá byrjanini í januar mánaði í 2000.

– Mítt arbeiði hevur verið at fáa fólk at dáma Rás 2, tí uttan undirtøku frá fólkinum ber ikki til at hava eina privata útvarpsrás, sum kappast við almenna Útvarp Føroya, sigur Óla Jákup Rólantsson.

Hann heldur sjálvur, at tað hevur hepnast hampuliga væl at fáa undirtøku millum manna.

## Framtíðin er bjørt

– Eg vóni og vænti eisini, at Rás 2 hevur eina framtíð fyri sær. Annars er alt mítt arbeiði farið fyri skeyti. Vit síggja, at politikarar eru farnir at tosa um at geva rásini betri umstøður at arbeiða undir, og tað er at frøast um, sigur Óla Jákup.

Hetta ber boð um, at áhugi er hjá myndugleikunum at hjálpa Rás 2 á veg, og tí er framtíðin ljósari hjá rásini.

Hann heldur eisini, at tað er sera umráðandi hjá rásini at fáa størri útbreiðslu í Føroyum og størri undirtøku.

Óla Jákup Rólantsson metir, at síðan Rás 2 fór at senda, er Útvarp Føroya broytt ómetaliga nógv, og tað er eisini blivið nógv betri.